# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Camilla Parker-Bowles fekk ein livandi veðr, nú hon fylti 60. Tey eiga alt, so hví ikki okkurt óvanligt?*
*(vinkona Camillu)*

# Norðurevropa flýtur

**Veðrið hevur býtt Evropa í tvey. Sunnanfyri er hitabylgja, og í fleiri londum í Norðurevropa regnar tað sum sjáldan ella ongantíð fyrr**



*Í Mið- og Vesturonglandi standa stór øki undir í vatni*

Í pørtum av Onglandi hevur tað regnað so illa, at í gjár framdi bretska flogvápnið Royal Air Force sítt størsta bjargingarátak í friðartíð. Ikki færri enn tíggju hernaðartyrlur máttu sendast at bjarga umleið 100 fólkum, eftir at regnið hevði lagt stór øki undir í vatni. Í fleiri øðrum førum sendi RAF tylrur við heilivági og øðrum til pláss, sum høvdu mist sambandið við umheimin orsakað av tí nógva regninum.

Støðan var so álvarssom, at Gordon Brown, forsætisráðharri, skipaði fyri kreppufundi millum stjórnina og tey, sum hava høvuðsábyrgdina av bretsku tilbúgvingini. Bretska løgreglan sigur, at í stórum pørtum av Mið- og Vesturonglandi var alt ein ruðuleiki, og fleiri hundrað fólk noyddust at gista í skúlum og aðrastaðni, tí vegir og jarnbreytir stóðu undir í vatni.

Tað hevur eisini regnað illa í fleiri øðrum norðurevropeiskum londum teir seinastu dagarnar. Í Týsklandi lá ferðslan still nógvastaðni, og har suðuri í Svøríki noyddust meiri enn 1.000 fólk at gista í skúlum og øðrum bygningum, tí regnið legði als samferðslukervið lamið. Í Danmark høvdu veðurmenninir boðað frá nógvum regni á Sælandi, men tað bleiv ikki so ringt, sum teir høvdu væntað.

Í fleiri londum longri suðuri í Evropa eru hitamátararnir uppi ígjøgnum, og har er langt ímillum ælini. Í Bulgaria og Rumenia hevur tað verið óvanliga heitt í seinastuni, og í Grikkalandi hevur tann nógvi hitin elvt til fleiri skógareldar.

# Turkaland heldur somu kós

**Tjóðartingsvalið í Turkalandi í gjár gjørdist ein dygg álitisváttan til Tayyip Erdogan, forsætisráðharra, og hansara nýskipanir.**

Við næstan 47 prosentum av atkvøðunum og 341 av teimum 550 tinglimunum vann turkiski stjórnarflokkurin ein sannan stórsigur á tjóðartingsvalinum í gjár. Tann stóri meirilutin í tinginum ger, at flokkurin hevur meiri enn tvær ferðir so nógvar tingmenn sum tann størsti andstøðuflokkurin og kann stýra einsamallur.

Men tað var eisini málið hjá Tayyip Erdogan, forsætisráðharra, sum undan valinum hótti við at taka seg burtur úr politikki, fekk flokkur hansara ikki avgjørdan meiriluta í tinginum í Ankara.

- Vit fara at halda fram við arbeiði okkara fyri Evropa. Vit fara at halda fram við teimum demokratisku nýskipanunum, og tann búskaparliga menningin fer at halda fram, segði Erdogan í takkarrøðu síni í gjárkvøldið.

Erdogan skrivaði út nýval í úrtíð, tí hann fekk ikki meiriluta í tinginum fyri at velja Abdullah Gül, uttanríkisráðharra til forseta. Millum annað var herurin ímóti tí, og í so máta var valúrslitið eisini ein álitisváttan til forsætisráðharran.




*Tayyip Erdogan, forsætisráðharri, og konan Emine Erdogan fagna valsigrinum hjá stjórnarflokkinum*

## STUTT SAGT

### Kurdar aftur á ting

Fyri fyrstu ferð í 13 ár hevur kurdiski flokkurin í Turkalandi, Demokratiski Samfelagsflokkurin, fingið umboð í turkiska tjóðartingið. Á valinum í gjár fekk flokkurin 24 av teimum 550 sessunum í tinginum, sigur CNN. Kurdarnir hava ikki havt umboð í tinginum síðani 1994, tá ein turkiskur dómstólur kom til ta niðurstøðu, at táverandi kurdiski flokkurin, Kurdiski Demokratiflokkurin, var ólógligur. Av tí at ein flokkur skal hava minst 10 prosent av atkvøðunum fyri at fáa umboð á ting, stillaðu tey kurdisku valevnini upp uttanflokka, men tey fara ætlandi nú at samskipa seg.

### Lynge í Parlamentið

Formaðurin í arktiska ráðnum í Grønlandi, Aqqaluk Lynge, fer mikudagin at halda røðu í Parlamentinum í London. Orsøkin er, at Parlamentið hevur eina hoyring um veðurlagsbroytingar, og í tí sambandi er fyrrverandi grønlendski politikarin boðin til London at greiða frá, hvussu veðurlagsbroytingarnar ávirka viðurskiftini í tí arktiska økinum. Við grønlendska útvarpið sigur Aqqaluk Lynge, at í røðuni ætlar hann sær at leggja dent á, hvussu veðurlagsbroytingarnar gera gerandisdagin hjá fiski- og veiðimonnum truplari.

### Kongur deyður

Mohammad Zahir Shah, sum var kongur í Afghanistan frá 1933 til 1973, er deyður. Hann var 92 ára gamal. Mohammad Zahir Shah bleiv koyrdur frá í 1973, tá hann var í Italia og leitaði sær læknahjálp, og har búði hann í útlegd til 2002, tá hann flutti aftur til Afghanistan. Hann fekk tilboð um at taka við trúnuni aftur, men tók ikki av.